# Havstovan søkir eftir
# skipara




## Søkt verður eftir skipara til nýggja havrannsóknarskipið Jákup Sverra at byrja skjótast gjørligt.

**Umsóknarfreist**
Umsóknirnar skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2021.

Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:

- Hevur høvuðsábyrgdina av skipinum.
- Hevur høvuðsábyrgdina umborð at allar viðkomandi skipanir verða fylgdar. Hesar eru m.a. ISM-skipanin og góðskuskipan, reinføri o.l. í sambandi við dagliga virksemið umborð.
- Skal seta seg inn í viðkomandi lógir og reglur, ið Havstovan og skipið arbeiðir eftir.
- Skal arbeiða í tøttum samstarvi við „túrleiðaran" á Havstovuni fyri hvønn túr.
- Annað fyrifallandi arbeiði.

**Førleikakrøv**

- Skiparaútbúgving.
- Heilsuváttan fyri sjófólk.
- Stórur dentur verður lagdur á at umsøkjarin hevur fiskiroyndir við trolara og royndir undir Føroyum.
- Galdandi prógv, so sum trygdarskeið, eldsløkking, sjúkraviðgeri og onnur viðkomandi skeið.
- Góðan førleika at samskifta.
- Stórur dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fíggjarmálaráðið. Starvsheitið er skipari.

**Umsóknir**
Skrivligar umsóknir við CV og avrit av viðkomandi prógvum og møguligum ummælum, skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2021.

Umsóknin skal sendast til:

**Havstovan, Nóatún 1, P.O. Box 3051, FO-110 Tórshavn**
ella teldupost: **hav@hav.fo**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Annfinn Hjelm, reiðara (annfinnh@hav.fo, tlf. 35 39 00 ella 21 54 75), ella til Birgir Lützen, skipara (birgirlutzen@outlook.com, tlf. 21 36 64).

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo